## Fróði heldur fram í B36

Ein av týdningarmestu spælarunum hjá B36, Fróði Benjaminsen, verður eisini í árstalsfelagnum komandi ár. Enn er sáttmálin ikki undirskrivaður, men sum skilst eru allir lutir í hesum greiðir. Í aðrar mátar verður hópurin hjá B36 eisini at kalla óbroyttur. Obi er farin til Skála, og í hansara stað skal ananr áleypari finnast. Hartil roynir Sylla at fáa sáttmála uttanlands, men í útgangsstøðinum verður roknað við, at hann verður partur av hópinum.



## Kortini øl í Parkini

Ágangurin frá dønum hevur verið harður, síðani UEFA gjørdi av, at FCK ikki slapp at selja øl við alkoholi í til heimadystirnar í Champions League. Og hesin ágangur hevur nú fingið UEFA at boyggja seg. Nú verður nevnliga sagt, at FCK fær loyvi at selja øl við alkoholi í, men at alkohol-innihaldið tó ikki má fara upp um 2,6%.



*Finalan í kappingini, sum í vár varð hildin í Hoyvíkarhøllini, stóð millum KÍ og EB/Streym. Úrslitið ta ferðina var 1-0 til klaksvíkingar*

## Nú er vinningurin brúktur

**Nýggjar bóltar og tiltøk til ungdómsfótbólt vórðu endamálini, sum vinningarnir hjá KÍ og EB/Streymi frá innandura-FM í vár vórðu nýttir til**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Longuundankappingarbyrjan var fyrsta FM-kappingin í fótbólti. Hendan var, tá Jákup á Borg skipaði fyri innandura-FM kapping, har fremstu fótbóltsfeløgini í landinum høvdu hvør sítt lið við.

Tey bæði fremstu liðini í kappinginin vunnu her kontantar vinningar, men ein treyt var áløgd teimum, sum tóku ímóti. Nevnliga at vinningurin skuldi nýtast til ungdómsarbeiðið í felagnum.

Og nú er eisini greitt, hvussu peningurin er nýttur. Klaksvíkingar gjørdist fremstir, og fyri hetta fingu teir ein kekk á 15.000 krónur. Tann peningurin varð nýttur til at endurnýggja bóltagoymsluna hjá yngru liðunum, soleiðis at hesi í ár hava verið serstakliga væl útgjørd á tí økinum. Júst bólturin er jú tað mesta grundleggjandi amboðið í fótbóltsspælinum, og hjá børnum og ungdómi er ein nýggjur bóltur mest sum at meta við nýggjan Mercedesbil hjá pápanum.

Silvurvinnarar í kappingini gjørdust EB/Streymur, sum vunnu 5.000 kr. Har er avgjørt, at peningurin verður nýttur til ymisk tiltøk, sum eru tengd at sparkivøllunum, sum eru gjørdir í teirra øki, og vóna tey, at hetta kann styrkja enn meira um annars blómandi fótbóltsmentanina í økinum.

Tað var Jákup á Borg, sum skipaði fyri kappingini, og hann ætlar, at hetta verður afturvendandi táttur.

– Eg haldi, at kappingin var væl-eydnað, men nakrir lutir kunnu sjálvandi betrast. Beint nú er trupulleikin at fáa hallarpláss, og tí veit eg ikki, júst nær kappingin verður aftur, men tað kemur vónandi upp á pláss. Og uttan stuðlar ber tað so heldur ikki til. Seinast varð kappingin stuðlað av Føroya Banka, Føroya Bjór, 3'aranum og Sosialinum, og teirra hjálp í hesum skal avgjørt ikki undirmetast, sigur Jákup.

# Spælarin má sjál

**Tað er bert við at hava so nógvar leikarar sum gjørligt á so høgum støði sum gjørligt, at vit veruliga kunnu fremja eina menning innan føroyskan landsliðsfótbólt, heldur Jákup í Stórustovu, leikaraumboðsmaður**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er bara eitt føroyskt virki, sum burtur av virkar í vinnuni, har fótbóltsspælarar verða keypir og seldir. North Atlantic Football Agency við Jákupi í Stórustovu, hevur nú fýra ár á baki, og er ikki frítt, at nakað er hent á økinum. Sjálvur byrjaði Jákup í yrkinum í 1998, tá hann saman við útlendskum umboðsmanni var við til at fáa Julian S. Johnsson til norska Kongsvinger, síðani havur hann fingið flestu av føroysku leikarunum sum hava verið uttanlands sáttmálað.

Tá FIFA-broytti reglugerðina til kravið um góðkendar spælaraumboðsmenn, var Jákup eisini millum teirra, sum stóðu fyrstu royndina.

### Vil skapa møguleikar

Við valinum av føroyskum yrkisspælarum í huga, var ikki frítt, at fólk yptu øksl, tá Jákup upprunaliga fór í gongd við virksemið sítt, men sjálvur sigur hann, at hann alla tíðina hevur havt eina trúgv uppá, at hetta er nakað, sum kann bera til. Og at hann hevur stórt álit og tiltrúgv til føroysku leikarnir

– Sjálvandi kanst tú siga, at talið av spælarum er avmarkað her hjá okkum. Men fyrst og fremst var eg sannførdur um, at tað var møguleiki at fáa hetta tal longur upp. Gjøgnum ár og dag havi eg fingist nógv við fótbólt, og eg bæði var og eri sannførdur um, at tað gevur stórar menningarmøguleikar fyri føroyskan fótbólt, um bestu spælarar okkara kunnu sleppa út um landoddarnar at royna seg. Við støðd okkara í huga, vil talið av hesum altíð sveiggjað nakað, men eg vildi mett, at vit í miðal eiga at hava einar 12-14 spælarar uttanlands, tey næstu árini, meðan talið kann økjast enn meira um eini 4-5 ár

– Men tað krevur eitt enn miðvísari arbeiði. Ikki minst er tað nærum eitt krav, at vit fáa eitt U-21 landslið. Her hevur FSF so meldað út, at tað verður arbeitt miðvíst við hesum, men enn er ikki staðfest, hvørt hetta arbeiði ber á mál.

– FSF og feløgini, gera eisini eitt alsamt miðvísari arbeiði fyri at menna ungdómsarbeiðið, og hetta gevur eisini úrslit. Tú kanst bara hyggja at hvussu nógvir ungir leikarar eru í formula og 1. deild. Og saman við hækkandi fakliga støðinum hjá venjarunum, hevur hetta eisini verið viðvirkandi til alsamt betrað úrslit hjá ungdómslandsliðum okkara.

– Tað er umráðandi at samstarvi við tey føroysku feløgini er gott og at tá leikarar fara uttanlands at venja verður hettar gjørt í tøttum samstarvi við tey.

– Havast skal eisini í huga at flestu leikarnir í dag hava sáttmálað við felag sítt her og kunnu tí ikki frítt fara, tað er umráðandi at føroysku feløgini fáa ágóða av tí miðvísa ungdómsarbeiðinum, tá leikari fer av landinum ,men tað vil altíð vera so at um leikari er sáttmálaleysur hevur hann, eftir ávísum reglum sum so frítt at fara.

### Skapar møguleikarnar

At tað tykist so, at aðrir gjarna vilja koma inn á føroyska marknaðin, nú FSF aftur hevur hildi FIFA-prótvøku, tykist hetta ikki vera nakað, sum Jákup vil gera tær stóru viðmerkingarnar til.

– Tað stendur frítt til ein og hvønn at fara upp til próvtøku. Men støddin á okkara landi er ikki serliga stór.



Við hesum sipar Jákup helst til, at tað í sjálvum sær er avmarkað, hvussu nógvar spælarar føroyingar kunnu rokna við at selja til útlendsk feløg.

Og heldur ikki vil hann gera viðmerkingar til, um ein kappingarstøða á lítla føroyska marknaðinum kann bera við sær, at onnur atlit enn tey hjá spælarunum verða tikin framum.

– Hesi fyrstu árini er so nógv tann størsti parturin av mínari orku farin við at skapa mær eitt kontakt-net. Tað er jú altavgerandi, at eg kenni tey røttu fólkini, um eg skal vera ein hjálp hjá teimum spælarum, sum eg umboði. Mín uppgáva er fyrst og fremst at skapa møguleikar